# Vitleyst at ríva SEV-tornið í Øravík niður

**– Nú bilaverja er sett upp, er ferðslutrupulleikin við SEV-tornið í Øravík loystur. At ríva tornið niður, loysir ongar trupulleikar, heldur Mortan Winther Poulsen, í Føroya Forngripafelag, sum hevur tikið stig til at friða SEV-tornið í Øravík**

FORNMINNI
*Áki Bertholdsen*

– Tað er púra vitleyst at ríva SEV-tornið í Øravík niður. Tornið hevur byggilistarligt og søguligt virði og tað loysir ongar trupulleikar at ríva tað gamla niður.

Mortan Winther Poulsen, formaður í Føroya Forngripafelag, heldur ikki, at tað er nøkur loysn at taka SEV tornið í Øravík niður.

– Vit kunnu ikki bara ríva alt niður, hvørja ferð vit fáa ein trupulleika.

SEV tornið í Øravík hevur annars elvt til mikið kjak, tí tað stendur so illa fyri, at tað er ein álvarsligur vandi fyri ferðsluna. Tað stendur dygst við vegin, mitt í einum svingi og tað hevur ikki verið so mikið sum ein bilaverja at forða fyri, at bilar rena á tornið, um tað skuldi hent, at teir fara útav í svinginum.

Tað er eisini hent oftani og hesi seinastu árini hevur tað at kalla verið eitt fólkakrav at tað varð tikið niður. Í summar var tað komið so langt, at SEV og Landsverkfrøðingurin ætlaði at taka tað niður og at byggja nýtt torn longri burtur frá vegnum.

Men so hendir tað, at ætlanin varð steðgað, tí Føroya Forngripafelag reisir friðingarsak. Og til hon er avgjørd, kann tornið ikki rørast. Sum ein avleiðing av tí, hevur Landsverkfrøðingurin í hesi vikuni sett bilaverju upp framvið vegnum við tornið, so at bilar ikki skulu kunna rena á tað, um teir fara útav.

## Trupulleikin loystur

Mortan Winther Poulsen sigur, at Forngripafelagið er eitt felag, sum hevur til endamáls at bjarga fornminnum, heldur enn tey verða rivin niður.

Og hann heldur, at tað er púra vitleyst at ríva tornið niður, fyri at bøta um ferðslutrygdina á økinum.

– Áðrenn vit tókui nøkur stig til at reisa friðingarsakina, kannaðu vit málið og vit vístu á, at ein bilaverja hevði loyst trupulleikan við ferðslutrygdini, sigur Mortan Winther Poulsen, ið sjálvur er verkfrøðingur og hevur arbeitt nógv við vegagerð.

– Nú er bilaverjan tíbetur sett upp og sostatt er trupulleikin við ferðslutrygdini á vegastrekkinum loystur, sigur hann.

Hann sigur, at tornið er eitt vakurt byggverk og hann heldur, at tað er heilt órímiligt at ríva tað niður.

Hann sigur, at tornið varð bygt í tjúgunum og tað hevur bæði byggilistarligt og søguligt virði. Byggilistarligt virði hevur tað, tí tað er eitt vakurt byggverk og søguligt virði hevur tað, tí tað umboðar tað allarfyrstu elektrisitetstíðina í Føroyum. Tí halda vit, at tað hevur stóran týdning at varðveita tað.

– Suðuroyingar vóru teir fyrstu í Føroyum, sum fingu streym fyrst í tjúgunum. Tá ið transformatortorn skuldu byggjast tá ið tíðini, varð farið til Danmarkar eftir fólki, tí her á landi var ongin kunnleiki á hesum økinum.

Í Danmark bygdu tey slík torn av tigulsteini og tí var sami máti eisini brúktur í Føroyum.

Mortan Winther Poulsen vísir á, at serliga í Suðuroy er nógv gamalt rivið niður, so at har eru næstan ongi fornminni eftir.

– Tað átti at fingið suðuroyingar at hugsa øðrvísi, enn teir hava gjørt, so at tað, sum hóast alt er eftir av tí gamla, verður varðveitt, sigur formaðurin í Forngripafelagnum.



*– Nú bilaverja tíbetur er sett upp framvið vegnum við SEV-tornið í Øravík, er trupulleikin við ferðslutrygdini loystur. Tað hevði verið vitleyst at tikið tað burtur av teirri orsøk, sigur Mortan Winther Poulsen, formaður í Føroya Forngripafelag*

# So nógv byggivirksemi í Vági sum sjáldan fyrr

**Seinastu trý árini hevur Vágs Býráð givið heili 49 byggiloyvi. Serliga hugaligt er, at ein næstan triðingurin eru byggiloyvi til vinnuvirki av ymsum slag, sigur formaðurin í teknisku nevnd**

FRAMBURÐUR
*Áki Bertholdsen*

Í Vági eru hjólini aftur farin at mala av álvara .

Eftir at Vágur var so hart rakt av kreppuni sum næstan onki annað pláss í landinum, fór gongdin at venda so spakiliga fyri nøkrum árum síðani.

Støðan var so vánalig í Vági, at onkur tvørafólk plagdu til stuttleika at spyrja, hvat ein rættur optimistur var:

– Jú, tað var ein sum seldi arbeiðsklæðir í Vági..........

Og rætt er, at tað stóð illa til, tí í kreppuni steðgaði næstan alt vinnulív, alt var steindeytt, fiskavirkini fóru á húsagang, tað hoyrdust ikki hamari smella og umsóknir um byggiloyvi vóru líka sjáldsamar sum lundi jólanátt.

Men hesi seinastu árini hevur framburðurin verið so stórur, at tað er næstan eitt undur og nú er aftur so nógv virksemið í Vági sum sjálvdan ella ongantíð fyrr.

Eitt gott barometur at lýsa, hvussu støðan er, hvussu byggivinnan er betri. Og eisini byggivirksemið í Vági vísir, at har hendir nakað.

Dánjal Bjarkhamar, formaður í teknisku nevnd hjá býráðnum, í Vági, sigur, at hesi seinastu árini hevur Býráðið avgreitt so nógv byggiloyvi til ymisk endamál sum sjálvdan, ella ongantíð fyrr.

– Øll tey fyrstu árini í kreppuni var alt steindeytt í Vági. Men so fór gongdin spakiliga at venda og seinastu árini hevur rættiliga nógv arbeiði verið í Vági.

Dánjal Bjarkhamar sigur, at seinastu trý árini hevur Vágs Býráð avgeritt ikki færri enn 49 byggiloyvi til ymisk endamál.

Í talvuni oman fyri sæst, hvussu nógv byggiloyvi, Vágs Býráð hevur avgreitt hesi seinastu árini.

Harumframt hevur tekniska nevnd eisini aðrar umsóknir um byggiloyvi, bæði til sethús og til vinnuvirki, hetta eru umsóknir, ið verða avgreiddar í næstum.

Dánjal Bjarkhamar er serliga fegin um, at næstan ein triðingur av teimum byggiloyvum, sum eru latin, eru til vinnuvirki av ymsum slagi. Ikki alt av hesum er bygt enn, men sumt er bygt, onnur bygging er um fara ígongd og uppaftur onnur bygging fer ígongd í næstum.

Hann sigur at fyri nógv tann størsta partin er talan um framleiðsluvirki av ymsum slagi, ikki minst um virki, sum framleiða til útflutings, eitt nú fiskavirki av ymsum slagi og lemmavirki hjá Injector Door.

Vert er eisini at leggja til merkis, at nýggja laksavirkið hjá Hera Hjelm, og har yvir 100 fólk skulu arbeiða, er ikki talt við, í uppgerðini yvir vinnuvirki, tí tað virki flutti inn í gamla Polarfrost.

## Nógv er broytt

Dánjal Bjarkhamar vil ikki leggja seg út í kjaki um, antin tað er rætt at lækka uttanlandsfrádráttin

Men hann vísir á, at eisini í útjaðaranum í Føroyum, i hvussu so er, summastaðni, er gongdin vend.

– Í Vági er so nógv at gera nú, og tað verður uppaftur meiri at gera, so hvørt, sum virkini, ið byggiloyvi er givið til, verða bygt- og farið verður til verka í teimum.

Hann vísir samstundis á, at í næstum skal eisini nýggjur miðnámsskúli byggjast í Vági og tað fer at kasta nógv arbeiði av sær til handverkarar.

– Alt í alt hendir nógv í Vági nú, og tað er rættiliga spennandi at sita í býráðnum nú, meiri spennandi enn tað hevur verið í nógv, nógv ár, sigur Dánjal Bjarkhamar.

| Ár | Byggiloyvi til sethús | Byggiloyvi til vinnuvirki | Onnur byggiloyvi (umbyggingar, bilhús, úthús o.a. | |
|---|---|---|---|---|
| 1999 | 5 | 3 | 4 | |
| 2000 | 6 | 6 | 6 | |
| 2001 (01. okt.) | 5 | 5 | 9 | |
| **Tilsamans 16** | | | **14** | **19** |



*Í Vági er so nógv at gera nú, sum salvdan, ella ongantíð fyrr og umsóknir um byggiloyvi koma býráðnum í hendi í einum jøvnum streymi*



# Atferðartruplir næmingar betri stuðul

**- Meginparturin av tímunum, vit fáa afturat næsta ár, verða latnir atferðartruplum næmingum, sum frammanundan fáa ov lítlan stuðul. Men eingin kann vænta, at fleiri næmingar fáa stuðul, tí støðan er framvegis undir alt lágmark, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum**

SERNÁMSFRØÐILIGT VIRKSEMI
*Turið Kjølbro*

Sernámsfrøðiliga virksemið innan fólkaskúlan fær sambært fíggjarlógaruppskotinum komandi ár 2,1 mió. krónur meir í mun til verandi játtan. Hetta kann tykjast sum ein stór øking, men kanna vit nærri, hvør tørvurin er á sernámsfrøðiligum virksemi, er meirjáttanin ógvuliga avmarkað. Vit kenna tørvin fyri í ár á serligum stuðli í skúlanum. Hann er 2500 tímar, verandi játtan røkkur til slakan helmingin, og tær 2,1 mió. krónurnar, sum koma afturat næsta ár, røkka til umleið 150-200 tímar afturat. Við øðrum orðum verða umleið 1400 tímar játtaðir, framvegis væl minni enn kendi tørvurin.

Mentamálastýrið veit ógvuliga væl, hvussu ring støðan er. Í upplegginum til fíggjarlógina komandi ár sigur stýrið, at støðan er tann, at næmingar, sum hava tørv á serligum stuðli í fólkaskúlanum, fáa ofta ov avmarkað tilboð, sum í fleiri førum als ikki er nøktandi. Fyri at veita teimum næmingum, sum hava tørv á hesum eina tænastu, sum liggur innan fyri lágmarkið, verður neyðugt at økja játtanina við 5 mió. krónum.

- Støðan er undir alt lágmark, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum.

Teir tímarnir, sum koma afturat komandi ár, verða latnir næmingum, sum frammanundan hava alt ov vánaligt tilboð.

- Atferðartruplir næmingar tørvar nógvar tímar, tí teir eru serliga krevjandi. Hesir fáa alt ov fáar tímar sum er, og tí fer meginparturin av tímunum, vit fáa afturat næsta ár, til hesar, umframt menningartarnaðar næmingar, sum eisini fáa ov lítið. Eingin kann tí vænta, at fleiri næmingar fáa stuðul, sigur Hans Eli Dahl.

## Tvørturum fakmørk

Tímarnir, sum Sernámsdepilin játtar til serligan tørv í skúlanum, kunnu bert játtast til læraratímar. Virkandi stjórin á Sernámsdeplinum heldur, at eitt skilagott hugskot hevði verið at havt onnur fólk enn lærarar inni í skipanini, sum høvdu verðið lønt øðrvísi. Føroya Lærarafelag loyvir hesum, um peningurin ikki verður tikin frá skúlaverkinum.

- Í einum skúla fyri øll er tørvur á øðrum enn lærarum. Høvdu almannaverkið og skúlaverkið fingið loyvi til at samstarva, høvdu vit kunnað tikið onnur enn lærarar inn, eitt nú hjálparfólk. Tí í mongum førum hevur barnið líka stóran tørv á einum hjálparfólki ella persónligum stuðli, sum einum lærara. Yvirfyri myndugleikunum hava vit víst á, at politiski myndugleikin má skera ígjøgnum hesum viðvíkjandi, sigur Hans Eli Dahl.

## Skapa serligan tørv

Sernámsfrøðiliga virksemið í Føroyum hevur altíð havt trong kor. Tó kunnu vit siga, at fyri nógvum árum síðani, áðrenn miðfyrrað serundirvísing varð sett í verk og skipanin æt serundirvísing, vórðu fleiri tímar latnir børnum enn tað verða í dag. Miðskeiðis í áttatiárunum vórðu 2300 tímar brúktir til serundirvísing. Í dag verða tímar latnir skúlunum til miðfyrraða serundirvísing. Hetta er ein kvota, sum verða latnir skúlum sjálvir at ráða yvir, til serundirvísing.

- Veruleikin er bara, at av tí, at skúlarnir eru so sperdir fíggjarliga, fara serundirvísingartímar millum skins og hold. Høvdu hesir tímarnir verið brúktir sum teir eiga, hevði tørvurin á tímum til serligan tørv verið minni. Eg eri bangin fyri, at vit skapa serligan tørv við ikki at traðka til beinanvegin við hjálp, geva næmingum eitt skump við miðfyrraðu undirvísingini, sum í grundini er ætlað at fyribyrgja trupulleikum seinni, sigur Hans Eli Dahl.

## Dygdin við sviðusoð

Eitt er sernámsfrøðiliga virksemið úti á skúlunum, annað er virksemið á sjálvum Sernámsdeplinum. Hagar koma fleiri og fleiri næmingar, alt meðan færri tímar verða latnir. Fer eitt nú ein lærari niður í arbeiðstíð vegna heilsubrek ella fer frá vegna aldur, fella tímarnir hesir hava undirvíst burtur. Tímarnir eru við øðrum orðum tengdir at lærarunum og ikki tørvinum, sum er á tímum.

- Játtanin innanhýsis fer, sum alt sær út, ikki at røkka. Vit hava víst á, at tørvur er á 5,6 mió. krónum fyri at fáa alt at hanga saman, men í fíggjarlógaruppskotinum fáa vit 2,1 mió. afturat, sigur Hans Eli Dahl.

Ein avleiðing av hesum verður til dømis, at fleiri næmingar verða koyrdir í bólkar fyri at spara.

- Hetta merkir, at hvør lærari verður trýstur meiri. Alt verður meiri ein spurningur um krónur og oyrum enn pedagogikk og dygd. Hetta sama síggja vit úti á skúlunum.

Sernámsdepilin eigur at hava tríggjar sálarfrøðingar í starvi. Tveir eru í løtuni og ein er í farloyvi.

- Hetta merkir, at bíðitíðin framvegis er ógvuliga long. Støðan verður ikki frægari av, at almannaverkið og skúlaverkið annars heldur ikki hava sálarfrøðing at bjóða fram, sigur Hans Eli Dahl.

## Gagnnýta verandi skipan

Ein trímannabólkur hevur gjørt eitt tilmæli um, hvussu sernámsfrøðiliga virksemið skal verða í framtíðini. Taka politikarar tilmælið í álvara, verður skjótt greitt fyri teimum, at uttan mun til hvat og hvussu nógv av tilmælinum setast skal í verk, kostar tað væl meiri, enn sernámsfrøðiliga virksemið kostar í dag.

- Eftir mínum tykki eiga vit heldur at brúka eitt sindur av pengum uppá at fáa skipanina sum hon er at virka, og fáa vit eina greiða samstarvsavtalu við almannaverkið og skúlaverkið, kunnu vit loysa sernámsfrøðiliga arbeiðið í Føroyum á jøvnum føti við sum tað er aðrastaðni, sigur Hans Eli Dahl at enda í viðtali.



*- Vit skapa ein serligan tørv við ikki at traðka til beinanvegin og geva næmingum eitt skump í rættari tíð, sigur Hans Eli Dahl, virkandi stjóri á Sernámsdeplinum*


Stórt tiltak á Hotel Norð
leygarkvøldið 20. okt. kl. 19.00

Galla døgurði
Felagssangur
Mótasýning
Dansur / COUNTRY-bólkurin

Mótasýning við:
Seytjan
JAP
La Femme

Aftaná verður dansur v/ COUNTRY-bólkinum

Kostnaður fyri alt kvøldið kr. 300,-
Kostnaður fyri dansin kr. 80,-

Buss-samband verður úr Klaksvík eftir forðastian og til Klaksvíkar eftir tiltakið

Bílegging á tlf. 45 12 44 ella 45 10 34 í seinasta lagi 18. oktober

Møguleiki er fyri gisting

Avmarkað atgongd

Hotel Norð



Tel. 451244 Fax 451245 FO 750 Viðareiði